# Messias í kirkjuni

Hesi seinnu árini hevur Havnarkórið sett sær fyri at framføra annaðhvørt ár Händels Messias og annaðhvørt ár Jólaoratoriið eftir J.S. Bach fram móti jólum. Í ár er aftur Messias á skránni, og framførslurnar verða nú um vikuskiftið

Tann fyrra framførslan verður leygardagin 1. december kl. 17.00 í Fuglafjarðar Kirkju og tann seinna sunnudagin 2. december kl. 20.00 í Vesturkirkjuni.

Solistar verða: Berghild Poulsen, sopran, Elsa Súsanna Dalsgaard, alt, Ernst Sondum Dalsgarð, tenorur og Hans Lawaetz, bassur. 15-manna kamarorkestrið mynda lærarar og næmingar musikskúlans við stuðuli úr Havnar Hornorkestri. Havnarkórið telur 40 sangarar, og leiðari í ár er Ólavur Hátun.




MESSIAS er sokallaðoratorium, kirkjuligt tónaverk, sum hevur sínar røtur í katólsku mótreformatióníni. Fólk møttust tá til uppbyggiligar fundir í sokallaðum oratorium, iðmerkir biðisalur. Hetta gav navn til bíbilskar tónleikaframførslur í hesum sambandi , sum løgdu støði undir hesa nýggju, mætu tónleikagrein.

Ikki er taðov nógv sagt, at týsktføddi og tónleikaliga italskt uppaldi onglendingurin Georg Friedrich Händel ( 1685-1759) meira enn nakar hevur skrivaðoratoriir, sum saman viðpassiónunum hjá samtíðarmanninum J.S.Bach verða standandi eftir í tónleikasøguni, tá ið tíðarinnar tonn hevur gnagað so mangt annaðburtur.

Heppiðvar taðfyri tey kirkjuliga tónleikahugaðu, at bretlandskongur í 1732 av pietistiskum ávum setti forboðfyri teatralskum framførslum av bíbliuhendingum á operupalli. Händel, sum frammanundan hevði veriðoperukomponistur fram um allar, varð nú av umstøðunum noyddur at geva sjálvari frásøgnini meira tyngd og persónunum eina djúpari lýsing, sum oratoriiðkrevur tað, iðikki eins og operan hevur sjónleikaralæti og íklæðing at styðja seg til.

Í flestøllum av hesum kirkjuligu verkum er taðsøga Ísraels, sum verður lýst, so sum heitini eisini geva til kennara: »Esther«, »Deborah«, »Samson«, »Joshua«, »Saul«, »Judas Makkabæus« og fleiri onnur. Men »Messias« hevur sína serstøðu. Her snýr taðseg ikki um at lýsa trupulleikar hjá einstøkum persónum, ella um, hvussu eitt einstakt fólk,Ísraels fólk, verður fríaðúr trongd og neyð; men um, hvussu øll mannaættin verður loyst frá synd og trega og reist upp á evsta degi. Teksturin og viðhonum musikalska íklæðingin lýsir søgu Krists frá fyrijáttan, føðing, lívi, deyða og fram til uppreisn.

Drúgt er hetta oratorium, eisini um, sum í hesum føri, ikki allir partar verða tiknir við. Men neyvan í allari tónleikasøguni er verk skrivað, sum soleiðis eins og ein perlurøðviðsínum resitativu frásøgnum, sínum undurføgru solosangum (arium) og sínum mongu máttmiklu, ljómandi kórpørtum hongur organiskt saman frá byrjan til enda.

Händel skrivaði »Messias«, hetta í fullari longd meira enn 2-tíma tónaverk, í musikalskari og religiøsari ekstasu eftir bert trimum vikum - eitt bragd, sum tónleikasøgan ikki kennir makan til. Og um enn skrivaðlongu mitt í hansara virkistíð, í 1741, so gjørdist hetta verkið yvir øllum verkum, hann læt úr hondum. Ár eftir ár varð tað framført undir tónaskaldsins leiðslu fyri stúgvandi fullum kirkjum og konsertsølum, og 8 dagar, áðrenn hann doyði, var tann blindi og likamliga avmaktaði meistarin viðtil at framføra hetta sítt yndisverk.

»Messias« hevur varðveitt sín tokka millum fólk, og ongantíðman hátíðarstundin kennast onglendingum sterkari, enn tá iðHalleluja-kóriðenn í dag lyftir mannfjøldina úr sæti, eins og taðgjørdi á fyrsta sinni fyri nú meira enn hálvttriðja hundraðárum síðan.

*Ólavur Hátún*

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Fleiri amerikanskir hermenn falnir

**Í hvussu er 16 amerikanskir hermenn og ein fregnartænastumaður eru falnir í bardøgum í Afghanistan.**

ÚTLAND

USA hevur seinastu vikuna sent hundraðtals herflotamenn til leiðina við býin Kandahar har suðuri í Afghanistan, og hermenninir hava longu verið í bardaga við Taliban-hermenn, sum verja býin, ið er høvuðsstøð hjá Taliban.

Talsmenninir hjá amerikansku stjórnini hava ikki verið serliga tíðindafróir, tá teir eru spurdir um gongdina í bardaganum um Kandahar, men pakistanska blaðið Frontier Post skrivar, at 16 amerikanskir hermenn eru deyðir í bardøgunum um býin.

Sambært blaðnum doyðu teir 16 hermenninir, tá amerikanararnir lupu á Dolangi-floghavnina í útsynning úr Kandahar seinasta mánadag. Blaðið visti at siga, at amerikansku hermenninir vóru í ferð við at fyrireika sær eina støð tætt við floghavnina, tá ein deild av Taliban-hermonnum leyp á teir.

Talsmenninir hjá amerikansku stjórnini hava einki grett um mannfallið, og vesturlendskir fjølmiðlar hava heldur ikki borið nøkur tílík tíðindi.

Hinvegin hevur amerikanska stjórnarumsitingin viðgingið, at ein starvsmaður hjá fregnartænastuni CIA doyði í Mazar-i-Sharif har norðuri í Afghanistan. Tann 32 ára gamli Johnny Spann doyði, tá amerikanskir og bretskir hermenn hjálptu Norðursamgonguni at berja ein fangauppreistur í býnum niður.

Minst 450 fangar lógu eftirá, og Amnesty International vil vera við, at nógvir av fangunum vórðu avrættaðir. Myndir hava víst, at fleiri fangar vóru bakbunnir, tá teir vórðu skotnir.

*(Fartekst)*








